## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Um morgunin hvassur vindur ella skrið av suðri og regn. Seinni sami vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stormur av útnyrðingi, út á seinnapartin minkar hann vindin nakað. Kavaælingur og hitin fellur niður til Frostmarkið.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +3 stig. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og regn. Lýggjari.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fyrst hvassur vindur ella skrið av útsynningi og regn. Hitin um 8 stig. Út á týsdagin snarar hann í norðan og veksur vindin møguliga til storm og kavaælingur Hitin um frostmarkið.

# Stór orð eru ov lítil

**Eivør er ein vøkur útgáva av Ronju Ránsmannadóttir skrivar ummælarin á Flensborgavisen um føroysku sonkvinnuna í ummæli av konsertini leygardagin.**



*Eivør hevur fingið eina serliga støðu í umhvørvinum kring dansk/týska landamarkið*
*savnsmynd: Símun Jóannesarson*

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Konsertin hjá Eivør í Flensborghuset leygardagin var sambært áskoðarum, ið vit hava tosað við sera væl eydna, og hetta tykist ummælarin í Flensborgavisen at vera samdur í.

Stór orð eru eru ov smá - m.a. soleiðis skrivar danski ummælarin Hans Christian Davidsen um konsertina við Eivør. Á longu frammanundan útseldu konsertini vóru um 500 fólk savnaði, tey flestu norðurlendingar, men eisini rættiliga fitt av týskarum. Eivør hevur trivist væl í økinum kring danskt/týska landamarkið. Á væleydnaðum konsertum á Tønderfestivalinum og á Tønder baseraða Danish Music Awards Folk, hevur fólkið á donsku síðuni á landamarkinum sýnt føroyska gimsteinum sín tokka, og leygardagurin vísti, at eisini hinumegin landamarkið er áhugin stórur.

Samanumtikið eitt sera jaligt ummæli, har ummælararin enn einaferð slær fast, at tað liggur ein stór megi í tónleikinum hjá Eivør, og sambært honum serliga tá hon syngur á føroyskum. Aftaná at hava hoyrt lagið Mín móðir samanber ummælarin Eivør við ein vakra útgáva av Ronju Ránsmannadóttir.

Ummælarin endar ummæli við, at hugleiða um, at ímeðan tað hevur stórt hóvasták gjørt burturúr MTV Europe Musiv Awards í Keypmannahavn, við eini rúgvu av gentum, sum ikki duga at syngja, kunnu hann og hini á konsertini sita í lítla Flensborg og hoyra eina fantastiska sangrødd, ið enn ikki er vorðin eitt verðinsnavn.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 23 |
| Athen | -- |
| Malta | 22 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 20 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | --- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágttrýst, 1002 hPa. vestan fyri Írland fer móti Íslandi og dýpist mógv.




**Í dag:**
Stormlágtrýstið yvir Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani til havið eystan fyri Føroyar fer í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/10 kl. 06⁰⁰– 5/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í november: - -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. 06⁰⁰– 18/10 kl. 06⁰⁰ Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

GEVIÐ BLÓÐ

## VESTFALLSKYRRINDI

3. november Mánin næstur jørðini
5. november Fullmáni
12. november Seinna kvarter
15. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. Nov. | 08.32 | 21.01 | 07.32 | 20.01 | 07.47 | 20.16 | 10.32 | 23.01 | 11.32 | - | 06.47 | 19.16 | 05.47 | 18.16 | 08.47 | 21.16 | 09.47 | 22.16 | 08.17 | 20.46 | 09.32 | 22.01 |
| 9. Nov. | 09.30 | 21.58 | 08.30 | 20.58 | 08.45 | 21.13 | 11.30 | 23.58 | 00.01 | 12.30 | 07.45 | 20.13 | 06.45 | 19.13 | 09.45 | 22.13 | 10.45 | 23.13 | 09.15 | 21.43 | 10.30 | 22.58 |
| 10. Nov. | 10.26 | 22.51 | 09.26 | 21.51 | 09.41 | 22.06 | - | 12.26 | 00.58 | 13.26 | 08.41 | 21.06 | 07.41 | 20.06 | 10.41 | 23.06 | 11.41 | - | 10.11 | 22.36 | 11.26 | 23.51 |
| 11. Nov. | 11.17 | 23.54 | 10.17 | 22.54 | 10.32 | 23.09 | 00.51 | 13.17 | 01.51 | 14.17 | 09.32 | 22.09 | 08.32 | 21.09 | 11.32 | - | 00.06 | 12.32 | 11.02 | 23.39 | - | 12.17 |
| 12. Nov. | - | 12.31 | 11.31 | - | 11.46 | - | 01.54 | 14.31 | 02.54 | 15.31 | 10.46 | 23.21 | 09.46 | 22.21 | 00.09 | 12.46 | 01.09 | 13.46 | - | 12.16 | 00.54 | 13.31 |

www.sosialurin.fo